From: Ria Torgarð <riatorgard@gmail.com>
Sent: mikudagur, 21. januar 2026 12:56
To: Hallur Markná <hallurm@logting.fo>
Subject: Viðmerkingar til lógarbroyting

Viðfest eru viðmerkingar frá mær til uppskotið um lógarbroyting í Løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og Yrkisleiklist v.m.

Blíðar heilsur

Ria Tórgarð

tel: 227471

Viðmerking til:

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m.

Broytingaruppskot til §1 - um at broyta heitið á lógini og brúka heitið palllist í staðin fyri leiklist.
LEIKLISTIN er kjarnuvirksemið í leikhúsinum, og lógin var smíðað tá myndugleikin tók avgerð um at seta á stovn Tjóðpall Føroya. Tjóðpallurin skal rúma fremstu leiklistini í landinum og geva yrkisleiklistafólki virðiligar arbeiðsumstøður.
Palllist er breiðari hugtak, ið umfatar aðrar listagreinar, ið verða framdar á palli. Hesar skulu, so hvørt tær mennast, finna sítt pláss og við tíðini skapa sjálvstøðug kor fyri at útinna sína list.
Tað er ein vanlukka um vakra orðið leiklist hvørvur úr lógartekstinum.

Broytingaruppskot til §2 - um at broyta Leiklistaráðið til Pallistaráðið
Púra burturvið og als ikki neyðugt.
Annars kundi ein onnur lógarbroyting verið, at minka um talið av ráðslimum, kanska niður í 3. At ráðið hevur 7 limir, ger tað trupult at arbeiða effektivt.
Um førleikakrøv til Leiklistaráðið stendur í viðmerkingunum: "Eisini verður við førleikakrøv sbrt. § 4, stk. 6 roknað við, at landsstýrismaðurin í kunngerð tryggjar, at ráðslimirnir hava vitan um og innlit í leiklist og leiklistaviðurskifti. "
Síðani lógin um Tjóðpall varð staðfest, hava skiftandi Leiklistaráð haft til upppgáuv at gera tilmæli um stuðul til umsóknir um stuðul til yrkisleiklist og tilmæli til landsstýirsfólki

Arbeiðið hjá Leiklistaráðunum øll hesi árini hevur verið merkt av at limirnir ikki hava haft neyðugt innlit og fakliga vitan um yrkisleiklistina. Orsaka av hesum, hevur ónøgd, ómegd og mistrivnaður mynda alt yrkisleiklista umhvørvið. Eftirmetingar av virkseminum á TP eru ongantíð gjørdar. Leiklistaráðið hevur harumframt viðgjørt umsóknir - meira um tað seinni.

§ 10
Hvat er áhugapallist????

§11 Stuðul til yrkisleiklist.
Serstaka játtanin til yrkisleiklist er serstøk, tí hon er einasta játtanin til ta leiklist, sum ikki rúmast á Tjóðpallinum - einasta lívsgrundarlag, ið yrkisleiklistafólk, ið ikki arbeiða á Tjóðpallinum, hava at dúva uppá fyri at fremja sína list.
Ein av uppgávunum hjá Leiklistaráðnum er at viðgera og tilmæla umsóknir, men øll hesi árini, eru feilir hendir í avgerðunum um tilmæli, umsóknarsvarini hava drigið út at fingið avgreitt í vikur og mánaðar, leiklistaráð hava ikki fylgt ásetingum í lógini um hvør hevur rætt til at fáa stuðul úr hesi pulju o.m.a.

Tað, ið hevur spurtst burturúr, eru órógvandi nógvar kærur og klagur - summar hava fingið viðhald, aðrar ikki og onkrar hava ikki fingið svar.

Dømi:
Eftir umsóknarumfari til stuðulin fyri 2025 vóru serliga nógvar klagur og kærur. Í 4 út av 8 førum var talan um feil. 3 av hesum førunum vóur kærd og har varð givið viðhald í øllum og Leiklistaráðið varð biðið um at tilmæla av nýggjum.

Arbeiðslagið í nú sitandi LLR er ikki gott, tað hava tit kanska verið vitni til í seinastuni. Vit báðar, Vár og eg, eru einastu limir í ráðnum, sum hava fakligu førleikarnar at meta um umsóknir listafakliga. Okkara sjónarmið verða ikki hoyrd og avgerðir verða tiknar, sum vit als ikki eru partur av.
At flyta umsóknar viðgerðirnar yvir í Mentanargrunnin, fer ikki at betra um støðuna.
Ótryggleikin, ivin, ónøgdin og kærumálini flyta við yvir til Mentanargrunnin, sum als ikki hevur fyrisitingarligan og løgfrøðiligan kapacitet at viðgera kærumál.
Tað er tí alneyðugt at fáa staðfest hvaðani størstu trupulleikarnir á yrkis leiklistaøkinum stava og hvussu teir kunnu loysast á bestan hátt.

Tí meti eg, at áðrenn avgerðin um at flyta játtanina verður tikin, skal eitt hugbursarbeiði til, har ongin ivi yvirhøvur skal vera um hvørjar umsóknir eru stuðulsførar - also uppfylla tey krøv, ið lógin tilskilar.

Galdandi lóg staðfestir greitt, hvat stuðul til yrkisleiklist umfatar og at har eru førleikakrøv til tey, ið skulu viðgera og gera tilmæli.
Um stuðuls umsóknir til yrkisleiklist ikki verða viðgjørdar í tráð við lógina, fer tað at verða atvoldin til at fríyrkis leiklistin í Føroyum spakuliga fánar burtur og doyr. Fríyrkis leiklistafólk gevast í yrkinum ella flyta av landinum.

Eg óttist fyri, at hetta er ein liður eini óhugnaligari tilgongd, sum hevur til endamáls at útihýsa teimum mest royndu og teimum við hægst útbúgvingum frá øllum postum, har týdningarmiklar avgerðir um yrkisleiklist skulu takast.

Eg mæli tí til hesar lógarbroytingar:
1 Minka um talið av limum í LLR. Skilgreina greitt hvørja uppgávu ymsu limirnir hava. Tryggja fakligheit hjá limunum.
2. Lóggeva soleiðis at landsstýrisfólki ikki kann sýta at tilmæla vegna politisk sjónarmið, listaligt útrykk ella innihald, men bert kann sýta um talan er um at formlig viðurskiti ikki eru í lagi. Hartl at landsstýrismaðurin hveur eftirlitsskylduna og eigur at sýta um Leiklistaráðið tilmælir stuðul, ið ikki lýkur formligu krøvini til at fáa stuðul eftir § 11
3. Stjórin á Tjóðpalli Føroya kann í mesta lagi sita 10 ár
4. Krøv til at fylgja og virða týðiligu skilgreinanina í lógini um at limir í ráðnum skulu hava fakligt innlit og vitan um leiklist.

Tað sum er allarmest umráðandi og møguliga ikki kann loysast við lóg, er ein mentan og ein hugburður hjá teimum sum verða vald til at vera ovasta leiðlsan á leiklistaøkinum. Teirra viðurskifiti við fríyrkisøki - tað sum ikki rúmast á Tjóðpallinum - hava altíð verið vánalig. Seinasta árið eru tey versnað meira einn nakrantíð. Hetta eigur at verað loyst. Ikki við at flyta yrkisleiklistafólkini út av teirra egna øki og yvir í Mentanargrunnin, men við at broyta mentaninna og hugburðin til økið og innan leiðsluna á økinum, soleiðis at tey taka á seg veruliga eisini at verða ráð hjá fríyrkisøkinum.